

## Í Vatnsoyrum

hevur kommunan havt eina útstykkingarætlan, men í hesum sambandi hevur verið neyðugt at flyta rættina sum stendur á Norðaraleiti. Ein kostnaðarmeting er gjørd av at gera eina nýggja, og mælir tekniska nevnd hjá kommununi til at flyta hesa rættina, tá tíðin er komin til tess. Fíggjarnevndin mælir til at gera semju við bóndan og Búnaðarstovuna um at flyta rættina og síðani at bjóða út arbeiðið at gera rættina. Bygdaráðið hevur síðani samtykt at gera semju við bóndan og Búnaðarstovuna um at flyta rættina, og síðan at bjóða út arbeiðið at gera rættina.

# Skúlin stinkar bæði so og so

**GILJANES Tað er eingin ivi um, hvat næmingarnir í 9. flokki á Giljanesi halda um sín egna skúla: "Skúlin er vánaligur og hann stinkar, bæði so og so". - Neiii, tað einasta rætta er at byggja ein nýggjan skúla. Tað er totalt langt úti at vit skulu ganga í einum skúla, sum er fullur í soppi, kemur tað samfelt - og neyvan óvæntað - frá teimum**

Snorri Brend

Nógva tosið um blámusoppin í Miðvágs-Sandavágs skúla - ella skúlan á Giljanesi - hevur eisini merkt samtaluna millum teir ungu næmingarnar.

Mikudagin undan páskafrítíðini vóru tey í skúla sum vanligt, tá umborð fyri tíðindatænastuna

**Slapp eg at velja millum skúlan á Giljanesi og tann í Sørvági, - ja, so hevði eg valt skúlan í Sørvági**

brádliga órógvaðu undirvísingina. Eftir avtalu við skúlastjóran, Hans Jørgensen steðgaði undirvísingin 10 minuttir fyrri enn ætlað.

Tey høvdu lívfrøði henda tíman. Men kanska var tað ikki av leið at fáa eitt slag av miðlabreyt í nakrar minuttir, og fáa at vita, hvussu fólk í tíðindatænastuni útvega sær tíðindi.

Evnið fyri vitjanini var stóra samtaluevnið í oynni: Hvat skal gerast við skúlan á Giljanesi - skal hann rívast niður og annar skúli byggjast ístaðin? Ella skal ein høvuðsumvæla skúlan, drena ordiligt og síðani halda fram við skúlagongdini her?

Fyri teir átta næmingarnar, sum vóru í skúla henda dagin var eingin ivi: - Rív skúlan niður sum skjótast. Bygg ein nýggjan.

Hetta siga tey, hóast tey vita at tey sjálvi ikki koma at uppliva ta løtuna at sleppa í ein nýggjan skúla, um tað altso verður úrslitið av teirri politisku viðgerðini. Men tað verða teirra børn og barnabørn sum koma at gera tað einaferð í framtíðini.

- Skúlin er kavrotin, allur sum hann er, siga tey við ein munn.

Vanliga eru tey 14 í flokkinum. Í dag vóru tey bara átta. Tað serstaka er, at ein av teimum seks kundi ikki vera í tímanum, orsakað av blámusoppinum.

### Luktar illa

Hvørki skúlastjóri, borgarstjóri ella ráðharrar tørvast at vera leingi saman við næmingunum í 9. flokki á Giljanesi, fyrrenn tey skilja, hvat hesi ungu hugsa um skúla teirra.

- Alt luktar og alt er kavrotið. Ja, sjálvt landakortini, sum vit draga niður til undirvísingina, eru rotin og lukta illa, siga tey.

Tey vísa á, at tað ikki bert eru landakortini sum eru gomul og rotin. Eisini karmurin undir vindeyganum var rotin, og skiftur út herfyri.

Og væl fjalt aftanfyri gardinurnar var eitt hol borað í veggin, fyri at vita um blámusoppur var betonginum. Hetta holið er nú tett aftur, men tað nervar kortini ikki tann veruleika at umstøðurnar í flokshølinum á ovastu hædd í skúlanum, kundu verið betri.

- Og so er eisini eitt hol í plátuni á vegginum her aftanfyri okkum. Tú sært. Her er bara eitt at gera.

### Sum edikkur

Í miðlunum hava verið vístar myndir av, hvussu blámusoppur sær út og hvar hann finst. Tað er kortini eitt, ið eingin miðil kann lýsa - luktin. Men hann merkja næmingarnir hvønn einasta morgun og hvønn einasta dag.

**Sjálvt landakortini, sum vit draga niður til undirvísingina, eru rotin og lukta illa**

- Tað luktar ringast um morgunin, tá vit koma í skúla. Tað er tí eisini onkur næmingur í flokkinum, sum ikki tolir henda luktin, fær ilt í høvdið og má tí fara til hús, siga tey.



**KAVROTIÐ**

*- Alt er rotið, sjálvt landakortini í stovuni, siga næmingarnir í 9. flokki í Giljanes skúla*

Mynd: Jens Kristian Vang



Luktisansurin hjá menniskjum er jú soleiðis innrættaður, at ein skjótt kann venja seg við ein ávísan lukt. Hetta sama hava næmingarnir merkt, og hetta sama hava foreldur teirra eisini merkt - ella rættari sagt: Ikki merkt nakað til longur: Tey hava snøgt sagt vant seg við luktin.

Ein regla í skúlanum sigur, at tey sleppa ikki at eta matpakkar sínar inni í flokshølinum. Og flokshølið verður eisini vaskað fleiri um dagin. Spurningurin er, hvussu nógv alt hetta hjálpir uppá luktin.

- Men tað eru tey nýggju í flokkinum sum siga frá tí. Tey merkja væl til henda luktin, sum tja, er ein blandingur av edikki og